26 ÁR EFTIR BUSSVANLUKKUNA UNDIR VALAKNÚKUM

# Vit kundu ikki

**FERÐSLUVANLUKKA** Í barnaheiminum í Pedda við Stein gøtu í Havn er aftur leikur og gleimur av børnum. Súsanna, vaksna dóttirin í húsinum, er heima í barnsburðarfarloyvi við døtrunum báðum. Møðgurnar, Poulina og Súsanna Slættanes lata í hesi grein upp dyrnar og minnast aftur á lagnutunga dagin beint undan jólum í 1986, tá húskið var við í bussinum, sum bóltaði av vegnum undir Valaknúkum í Eysturoy



» Eg náddi bara at hugsa, *Hvat hendir her?* So var alt rumbul og ruðuleikι, og eg visti ikki, hvat vendi upp og niður

– Vit fingu brádliga hugskotið at fara norður við jólagávum til skyldfólk í Klaksvík hendan sunnumorgunin. Veðrið var so vakurt, hóast kalt og eitt sløð av kava lá. Nógv hevði verið gjørt burtur úr jólunum fyri børnum í bæði sjónvarpi og útvarpi, og eg hevði skrivað ein jólasjónleik, sum var væl móttikin í nunnuskúlanum nakrar dagar frammanundan. Jólamansbúnin var eisini í viðførinum. Hann ætlaði eg mær í umborð á Ternuni, fyri at gleða børnini í grannalagnum á Biskupsstøð. Hetta var samanumtikið ein ljósur »stytsti« dagur, sum vit øll gleddu okkum til, greiðir Poulina Slættanes frá.

### Vónrík

21. desember 1986 var Súsanna Slættanes trý ár. Hon var spent at sleppa til Klaksvíkar við foreldrunum og 13 ára gamla beiggjanum, Páll, at vitja systkinabørnini í Klaksvík. Hon var í reyðum sokkabuksum og kálvaskinsfeldi. Seks ára gamli beiggin, Rani, vildi heldur vera heima, tí tey eru grannar hjá Barnaheiminum, og hetta var dagurin, har tyrlan fór at lenda har við jólamanninum. Sum siður var, vóru børnini í grannalagnum vælkomin á Barnaheimið hendan dagin.

– Bussurin fór frá Auto klokkan 10:30. Fleiri børn úr hondbóltsfelagnum Neistanum ætlaðu sær við bussinum. Tey høvdu ikki fingið boðini um, at dysturin, tey skuldu leika, var avlýstur, tí tey mangladu dómara. Bussførarin gav teimum boðini, so tey ikki fóru til fánýtis, og tíbetur tað, greiðir Poulina Slættanes frá. Hon hevur verið lærari í Sankta Frans skúla í meiri enn ein mansaldur.

– Vit fara so við bussinum niðan eftir Oyggjarvegnum, sum gjørt varð tá, niðan í kuldan. Hálkan kom sum eitt skot. Eingin gav sær far um annað enn ein øðrvísi jólaligan og stuttligan sunnudag. Vit skuldu geva gávur, hitta sysktkinabørn, eta góðan døgurða og so heim at halda jólafrí.



Onnur síðan á bussinum, sum fór oman í fjøruna, er í sorli. Hin er ikki so illa farin, sum tað sæst á myndini



Dindablaðið sosialurin

Nr. 146 ★ týsdagur 23. desember 1986 59. árg. ★

*Størsta ferðsluvanlukkan:*

**Bussur bóltaði oman í fjøruna**

**Tveir bussar hjá Bygdaleiðum [..]ndu saman og síðani útav. Veðrið var gott og somuleiðis útsýnið. Men vegurin er ov smalur fyri tveir bussar, har vanlukkan hendi.**

**Men báðumegin við eru víkistøð, bara 39 metrar eru millum tey. Hvørgin bussførarin steðgaði tó og bíðaði eftir hinum.**

Tríggjar kvinnur doyðu og níggju fólk blivu løgd inn á Landssjúkrahúsið, tá higartil álvarsligasta ferðsluvanlukkan í Føroyum hendi beint fyri døgurða sunnudagin. Vanlukkan hendi undir Vaðlaknúkum á Skálafjørðinum.

Tær tríggjar, sum doyðu, sótu frammanfyri í bussinum, sum bóltaði av vegnum oman í fjøruna. Tær blivu funnar undir vrakinum, allar á sama stað. Tær vóru systrarnar Sigrid Winthereig, 69 ár, og Elseba Jacobsen, 74 ár, úr Havn og Milly Kristina Hansen, 62 ár, av Norðskála.

Sandbáturin Havsand tók upp bussin, sum fór oman í fjøruna og flut[...] hann til Havnar. H[...] bussurin varð koyrdur ú[...] á Toftir. Hann kom til Havnar við Dúgvuni.

Bileftirlitið kannar nú báðar bussarnar. Hetta er bussurin, sum fór oman av vegnum. Helst er vegurin skrædnaður undan honum. Har er sera smalt, bara 5,20 metrar. Landsvegir, nú verða gjørdir, eru vanliga 10 metrar breiðir.

**Meira um bussvanlukkuna inni í blaðnum**

## Tríggjar konur doyðu

Sjálv fekk Poulina staðfesti brák í nakka og hálsgeisla. Steinbjørn hevði brotið fleiri riv og fekk pentur seymaðar í lær og legg. Páll hevði eitt stórt sár í beininum, sum hann mátti skurðviðgerast fyri. Øll 13 fólkini, sum yvirlivdu, vóru flutt á Landssjúkrahúsið til viðgerðar.

– Onnur sluppu nógv verri frá vanlukkuni enn vit. Bussvanlukkan travdi trý mannalív. Tríggjar konur doyðu. Tvær teirra vórðu slongdar út gjøgnum rútarnar og lógu undir bussinum. Tær sótu í somu síðu sum vit. So vit kenna okkum sjálvandi takksom at sleppa við lívinum.

### Skadd fyri lívið

Beinið á Súsonnu var so mikið illa farið, at hon mátti til Danmarkar at fáa viðgerð. Beinið var illa brotið og brent, og hon hevði mist stórar partar av vøddum og húð. Sjálv var Poulina ikki ment at fara, tí hon var illa fyri og hevði kraga um hálsin.

– Systir mín og táverandi svágurin fóru niður við Súsonnu annan jóladag. Sjálv fór eg niður á Ríkissjúkrahúsið til Súsonnu dagin fyri nýggjársaftan. Tá var tað, sum gekk tað upp fyri mær, at hetta fór at ganga, tó at beinið var illa farið.

26 ÁR EFTIR BUSSVANLUKKUNA UNDIR VALAKNÚKUM

# sita bundin

Framhald á síðu 8



# Vegurin ov smalur

5,20 metrar var ov smalt fyri tveir bussar. Báðir bussførararnir hevdu møguleika at steðga og ... til hin var farin fram- ... en hvørgin steðgaði. ...urin úr Havn fór ... við einum rættiliga ... plássi, tað er ... Hin ... 39

## Ongin autoverja

Henning Jacobsen hjá landsverkfrøðinginum, sum umsitur landsvegirnar, veit ikki, hví ongin autoverja er júst á hesum vegarstrekkinum undir Vaðlaknúkum. Hann sigur, spurningurin ivaleyst verður viðgjørdur nú.

Landsverkfrøðingurin brúkar einar 2 mill. kr. um árið til autoverjur. Nú er autover... ...við stívliga ...tið er 420

*Her sæst hvussu smalt er. Lastbilurin er nøkunlunda eins breiður og bussarnir. Bussarnir stoyttu saman vinstrumegin framman og skumpaðu hvønn annan útav*



*– Eg minnist einki frá sjálvari vanlukkuni. Men við tað at eg havi mist ein triðing av mínum førleika, hevur hon sjálvandi merkt meg tað, sigur nú 29 ára gamla Súsanna Slættanes*

*Mynd: Rannvá Egholm*

– Tá vit koma norður á Norðskála, kemur ein kona upp í bussin, sum vit kendu. Hon skuldi eisini til Klaksvíkar við jólagávum, men hon vann ikki vegin fram. Vit sótu høgru megin í bussinum, maður mín, Steinbjørn, við Súsonnu dúrandi í fanginum. Páll sat vinstrumegin.

## Hvat hendir nú?

Í útvarpinum vóru hugnaligir jólasálmar frá eini gudstænastu – í menniskjum var góður tokki. Klokkan var 11:50. Nú kemur ein mótkoyrandi bussur, sum skuldi framvið okkara bussi. Mann hevur nú fingið varhugan av, at vegirnir eru ógvuliga hálir.

Um nakar heldur tað vera óneyðugt at sita í trygdarbelti, tí mann klárar at halda sær føstum í einum akfari, sum fer bóltandi, vil Poulina fegin vera við til at avlíva ta mýtuna:

– Eg náddi bara at hugsa, »Hvat hendir her?« So var alt rumbul og ruðuleiki, og eg visti ikki, hvat vendi upp og niður. Tú fellur ikki í óvit, men missir skilið fyri javnvág, og fært einki gjørt at stýra støðuni. Centrifugalmegin er øgilig, og vit vórðu slongd úr bussinum, minnist Poulina.

– Hvat hendi? Hví siti eg her? Eg var ísakøld og føldi, at tað var galið við hálsinum og nakkanum. Skógvarnir vóru vekk. Lastikkið um hestahalan var vekk. Steinbjørn var næstan kvaldur í slipsaknútinum. Vit høvdu øll djúp bløðandi sár, skeinir og skursl fleiri staðni. Eg var skelkað, og tað er ilt at seta orð á. Páll fann eg beinanvegin, og Steinbjørn var eisini har. Men hvar var okkara lítla genta? Vit vóru frá okkum sjálvum.

## Føst undir bussinum

So síggja tey hendan bussin, og har inni var eitt stórt kaos.

– Steinbjørn gjørdi alt sum stóð í hansara makt at finna Súsonnu. Hann finnur hana undir afturendanum á bussinum, har motorurin er. Motorurin var framvegis í gongd. Hon liggur næstan øll undir í sjógvi, og tað var fløðandi sjógvur. At fáa hana leysa var ógjørligt. Tó fekk hann trýst eina tasku undir høvdið á henni. Hon var uttan vit. Tá verður beinanvegin sagt, at krani mátti til, fyri at fáa lyft bussin, tí hon kundi ikki hálast undan.

Tað gekk skjótt, at forbíkoyrandi bilar vóru á staðnum. Men hetta var áðrenn fartelefonirnar, so tann, ið kom fyrst, mátti koyra til bensinstøðina í Skálabotni at ringja eftir hjálp.

– Tað er løgið, sum mann reagerar, tá mann fær skelk. Minnist, at eg trættist við Jógvan Esmar Ósá, sum var ein av løgreglumonnunum á staðnum, at eg mátti sleppa norður við jólagávunum. Fór jú úr Havn í jólahýri við jólagávum og føðingardagsgávum frá familjuni á Argjum, fastrini hjá okkum í Havn og okkum sjálvum. Hevði hesi ørindi at avgreiða fyri so nógv av skyldfólkunum her. Skilji tað ikki í dag – tað er sum at eg noktaði at finna meg í hesi broyttu støðuni. Hetta skuldi vera ein stuttligur dagur!

– Tvær tyrlur komu á staðið, og har var so mikið hált, at mann ikki fekk staðið á beinunum. Rajani skurðlækni, sum var til eina jarðarferð úti í Runavík, varð skjótt boðsendur, tí allar læknakreftir máttu stíga til. Hann fór við Steinbjørn og Súsonnu á Landssjúkrahúsið við aðrari tyrluni. Tað galt um at gera skjótt av, tí lærleggurin var illa brendur, og har vóru trý opin beinbrot í vinstra beini.

## Mín revsing

Poulina slapp ikki við tyrluni, men koyrdi suður við einum frá tilbúgvingini á Skálafjørðinum.

– Koyrirtúrurin av vanlukkustaðnum til Havnar, er eitt tað ringasta, eg havi verið úti fyri. Páll og eg fylgdust til Havnar. Hann hevur havt tað ringt, tí eg vildi alla tíðina hoyra útvarpið, men førarin, sum helst var ein skálamaður, royndi at dempa. Gudstænastan var avbrotin av vanlukkuni. Eg var greið um, at tað stóð illa til við Súsonnu, og væntaði tað ringasta. Hann, sum koyrdi okkum til Havnar, hevur helst óttast fyri, at deyðsboð komu um Súsonnu umvegis útvarpið. Hann royndi tað, hann kundi at leiða tankarnar aðrastaðni, at tað nokk fór at ganga. Eg minnist, at telefonkervið brendi saman sum so ofta, tá okkurt álvarslig hendir í okkara lítla sárbæra samfelagi.

– Eg kendi tað sum, at hetta var mín revsing, at eg skuldi vera so býtt og fara norður at spæla jólamaður á vetrardegi. Eg hevði sæð, hvussu bussurin lá, og hvussu hann hevði skrætt eyr, steinar og flag oman við sær. Eg var fyrireikað uppá, at Súsanna var deyð – eg var ikki í iva um tað, minnist Poulina.



## Hon livir!

Tá tey nærkaðust Landssjúkrahúsinum, tordi Poulina ikki at fara inn at fáa dómin. Teir báðir læknarnir, Anders Harboe Ree, systkinabarn Poulinu, og Erik Norderø, sáli, sum var giftur systkinabarni hennara, stóðu fyri henni við koyristóli. Hon var ikki væl fyri, hevði bløðandi sár, og nakki og hálsur høvdu fingið løst og skelkurin var meinur.

– Eg hugsaði, at mann helst tilvitað hevði sett júst teir báðar at taka ímóti og siga mær frá, at vit høvdu mist Súsonnu, líkasum fyri at gera tað eitt sindur eirindasamt.

Vinstra bein var álvarsliga meiðslað. Men teir søgdu, at tamarhald var á støðuni, men at hon var sera álvarslig. Tað var ein ovurhonds stórur uggi.

# Mýtur um trygdarbelti

***»Eg skal bara ein stuttan túr, har eg koyri seint, so eg kann halda ímóti við ørmunum, um eg renni á«***
Tað ber tikki til at halda ímóti trýstinum, um akfarið rennur á, tó at ferðin er lítil. Vigar tú td 75 kg og rennur á ein múr við 50 km/t, skalt tú halda móti einum trýsti á 1,5 tons. Tað kann einki menniskja.

***»Eg verði kleimd/ur í akfarinum, um eg eri í trygdarbelti«***
Tað hendir, at fólk verða kleimd føst inni í bilinum. Men alternativið er, at tú fært fleiri og álvarsamari skaðar, um tú verður slongd/ur úr akfarinum, tí tú ikki vart íbundin.



***»Eri eg í trygdarbelti, sleppi eg ikki út, um eldur kemur í«***
Kemur eldur í bilin, er tað betri at vera íbundin í trygdarbelti. Tí ert tú í trygdarbelti, er meiri sannlíkt, at tú hevu vit eftir vanlukkuna.

***»Eri eg ikki í tryddarbelti, verði eg bjargað/ur, tí eg verði slongd/ur úr bilinum«***
Tað er tryggdast at vera inni í bilinum, um ein vanlukka hendir. Í flestu førum er bilurin so mikið heilur, at kabinan sum heild er óskalað. Vandin at doyggja ella verða álvarsliga skadd/ur, er 5-10 ferðir størri, um tú verður slongd/ur úr bilinum.

***»Eg havi stoytkodda (airbag), og nýtist tí ikki trygdarbelti«***
Stoytkoddin er umframt trygdarbeltið og ikki í staðin fyri tað. Brúkar tú ikki trygdarbelti, kann stoytkoddin vera lívshættisligur.

*Kelda: www.sikkertrafik.dk*